**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 03.06.2020

Kl: 16:00–17:30

Til staðar: Nelly Haakonardóttir Debes, Marjun Danielsen, Sigrun Helga, Ragnar Isaksen, Turið G. Hansen og Høgni Warberg. Vivi møtti ikki til fundin.

Skrá

1. Góðkenna fundarfrágreiðing

2. Status viðvíkjandi reiggjum

3. Garðdagur

4. Fimleikarhøllin

5. Ymiskt

Att 1: Fundarfrásøgnin varð góðkend.

Att 2: Nú er endliga staðfest, at pengar eru játtaðir til reiggjur, og Høgni fer alt fyri eitt at seta bíleggingina í gongd, og reiggjurnar miðað verður ímóti, at reiggjurnar eru settar upp í seinasta lagi áðrenn primo november 2020. Talan er um 2 vanligar reiggjur og 1 fuglareiður, og samlaði kostnaðurin alt íroknað verður í alt 71.000,-kr.

Att 3: Avgjørt varð fyribils at útseta garðdagin til einaferð í september.

Att 4: Vit fundaðust um fimleikarhøllina, og gingu so okkum ein túr at hyggja eftir hvussu høllin og umklæðingarrúmini nú síggja út. Vit gleddust um tað mesta av tí vit sóu, men semju varð um, at gólvini í umklæðingarrúmunum í sera stóran mun misprýða heildarmyndina, og at gólvini so heilt avgjørt áttu at verið umvæld, nú tá alt rundanum er vorðið so nógv snøggari. Eftir fundin orðaði Nelly eitt skriv til kommununa við áheitan um at játta pengar til gólvini. Hetta skrivið var sent kommununi dagin eftir fundin.

Att 5: Høgni kunnaði um korona skúlagongdina og eitt sindur um komandi skúlaár.
Tosað varð um, at saknur var í einum starvsfólki, sum burturav kann taka sær av húsavarðauppgávum í skúlanum og Áarlon. Ragnar segði seg fara at taka hetta upp við rætta viðkomandi.
Komandi skúlastýrisfundir verða tann 9. september kl. 16, síðan felagsfund við skúlastýrið í Vestmanna tann 23. september í Kvívík og so felagsforeldrafundin hjá skúlastýrinum tann 4. november